

# Jólini nærkast

Jólini nærkast, og í tí sambandi bjóðar Rás2 eina spildurnýggja jólasending hvønn gerandisseinnapart hetta til jóla.

**FACEBOOK-KAPPING**

Sendið myndir av jólahaldi, fittum børnum, hugna, jólastemningi ella øðrum. Øll, sum uploada jólamyndir inn á okkara FB síðu, eru við í lutakastinum um eitt Nintendo DS frá leikahandlinum "Klávus" í sms. Drigið verður tollaksmessudag, 23. desember, og allar myndir eru við í dráttinum.



Vit fregnast, hvussu føroyingar fyrireika seg til jólini -bæði heima og uttanlands. Hvørjar siðir hava vit, hvat dámar okkum væl, og hvat dámar okkum minni væl við jólunum?

Og sjálvandi verður eisini nógvur, góður jólatónleikur.

Harumframt enda vit hvørja sending beinleiðis úr sms, har ein stór jólakapping er á skránni.

## Jólini nærkast á rás2

# Skráin hjá Rás2

### Týsdagur 8. des.

15:00 Tíðindi
15:05 Jólini nærkast
16:00 Tíðindi
16:10 Jólini nærkast
17:00 Tíðindi
17:15 Tónleikur
18:30 Tíðindi (e)
19:00 Tónleikur
21:00 Á Torginum – Gestur á Torginum verður Dávur Neshamar, ættaður úr Fuglafirði. Absalon Absalonsen er vertur
22:35 Tónleikur
00:00 Liðugt

### Mikudagur 9. des.

07:00 Tónleikur
09:00 Morgunsendingin – Eyðun Klakstein og Mirjam Pætursdóttir eru vertir
11:00 Tíðindi
11:05 Morgunsendingin
12:00 Tíðindi
12:15 Hitt-tónleikur
13:00 Ynskiløtan
14:00 Lýsingar
14:05 Ynskiløtan
15:00 Tíðindi
15:05 Jólini nærkast
16:00 Tíðindi
16:05 Jólini nærkast – Framh.
17:00 Tíðindi
17:20 Tónleikur
21:00 Úr skjáttuni – Frants Jensen leggur til rættis.
22:00 Tónleikur
00:00 Liðugt

### Hósdagur 10. des.

07:00 Tónleikur
09:00 Morgunsending
11:00 Tíðindi
11:15 Morgunsending
12:00 Tíðindi
12:20 Hitttónleikur
13:00 Ynskiløtan
14:00 Lýsingar
14:05 Ynskiløtan
15:00 Tíðindi
15:05 Jólini nærkast
16:00 Tíðindi
16:05 Jólini nærkast – Framhald
17:00 Tíðindi
17:15 Bilradio – Magnus Gunnarsson er vertur.
18:30 Tíðindi (e)
18:50 Tónleikur
00:00 Liðugt

**MORGUNSENDINGIN MIKUDAGIN 9-12**



## Søguskrivarin

Hans Andrias Sølvará er søgufrøðingur, sum hevur skrivað fleiri søgubøkur seinnu árini. Hann hevur skrivað um eitt nú løgtingið og um Klaksvík. Men hvussu er at tulka og skriva um farnar hendingar, hvussu finnur mann eina rættvísandi mynd av søguligum hendingum, og hevur søgufrøðingurin sjálvur stóra ávirkan á, hvussu søgan kemur at ljóða? Tað spyrja vit millum annað, tá ið Hans Andrias Sølvará vitjar á Rás2.

RÁS ...títt jólaradio

## Bilradio – Hósdagin kl. 17.15

Í sendingini er m.a. samrøða við Jørgen Thygesen frá Berner, ið hevur ferðast sum ferðandi sølumaður í Føroyum í næstan 30 ár og nú flytur heim aftur til Danmarkar. Eisini verður fyrsta eldrivna trilliboran í Føroyum royndarkoyrd.



Jørgen Thygesen